


www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 11 - 2011

# Irak í samstarv við Shell og Mitsubishi

Stjórnin í Irak hevur skrivað undir eina handilsavtalu við Shell og Mitsubishi um at útvinna gass úr teimum stóru oljuleiðunum har suðuri í landinum. Eftir avtaluni skulu irakar og tey bæði feløgini stovna eitt nýtt felag, sum fær navnið Basra Gas. Tað almenna irakska felagið South Gas skal eiga 51 prosent av partapeninginum, og Shell og Mitsubishi skulu eiga ávikavist 44 og 5 prosent. Irakski oljumálaráðharrin sigur, at tey næstu 25 árini fer felagið at gera íløgur fyri 100 milliardir krónur. Ráðharrin sigur seg vera fegnan um avtaluna, tí hon fer at geva Irak atgongd til nógv gass, sum kann brúkast til el og til ídnaðin. Herfyri frættist, at lokalstjórnin í Kurdistan í Norðurirak hevði gjørt eina avtalu við amerikanska oljufelagið ExxonMobil, sum skal leita eftir og framleiða olju og gass í seks ymiskum teigum har norðuri í Irak.